# - Harhoff hevur skift meining

**Føroyar hava søkt um fullan limaskap í Norðurlandaráðnum og ráðharraráðnum, men Frederik Harhoff ríkisrættarserfrøðingur, sigur limaskapin vera ímóti grundlógini. – Embætismenn hava trýst hann at broyta meining, sigur Høgni Hoydal**

POLITIKKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*



*- Vit fara at halda fram at stríðast fyri fullum føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum, sigur Høgni Hoydal*

Høgni Hoydal setti saman við Kára P. Højgaard gongd á málið um at Føroyar skuldu hava fullan limaskap í Norðurlandaráðnum og ráðharraráðnum.

– At byrja við stuðlaðu serfrøðingar okkum. Men Frederik Harhoff hevur skift meining. Tað eru embætismenn úr danska uttanríkismálaráðnum, ið hava trýst hann at broyta meining, sigur Høgni Hoydal.

– Heimildarlógin verður brúkt sum høvuðsorsøk til at Føroyar ikki kunnu fáa fullan limaskap, tí sambært henni kunnu Føroyar ikki gera avtalu við onnur lond vegna seg sjálvi. Um Føroyar skal gera avtalur við onnur lond, skal tað gerast vegna danska ríkið. Tjóðveldisflokkurin hevur alla tíðina ávarað ímóti heimildarlógini, tí vit vóru bangin fyri, at hon fór at vera hátt.

– Samgongan segði, at heimildarlógin skuldi virka fyri, at vit kundu fáa limaskap í Norðurlandaráðnum, men tað teir søgdu var ósatt.

Men Høgni Hoydal ætlar at halda fram at stríðast fyri fullum føroyskum limaskapi.

– Til orðaskiftið um føroyskan limaskap á ársfundinum í Norðurlandaráðnum, ið verður um mánaðarskiftið oktober – november fara vit at royna, at fáa undirtøku frá tinglimunum í hinum limalondunum.

– Men um danska stjórnin heldur fast við frágreiðingina hjá Frederik Harhoff, um at føroyskur limaskapur er ímóti grundlógini, so fer málið fyribils at detta niðurfyri, sigur Høgni Hoydal.

STUTT SAGT

## Rok í vikuskiftinum

Frá vakthavandi skilja vit, at Leygarmorgunin gjørdist nakað buldrasligur hjá løgregluni í Havn. Løgreglan fekk at vita, at rok var uttanfyri náttklubban Glitnir í Havn, og tískil gjørdi løgreglan av, at fara oman har fyri at vera sjónlig, og harvið kunna forða fyri einum bardaga. Men lítið hjálpti. Menn fóru til hendurs, og løgreglan mátti leggja ímillum.

Tveir mans løgdu gjørdi seg eisini inn á løgregluna, og tað sum spurdist burturúr var, at báðir vóru handtiknir. Teir eru skuldsettir fyri harðskap ímóti tænastufólki. Frá løgregluni skilja vit, at tílík mál eru óvanlig í Føroyum.

Sunnumorgunin var tað heldur friðarligari. Onkur koyrdi ávirkaður av rúsdrekka, men annars hevði løgreglan ikki so nógv um at vera sunnumorgunin, skilja vit á vakthavandi.

# - Grundlógin kann ikki tulkast

**Á Norðurlandaráðsfundinum mikudagin kom fram, at fullur føroyskur limaskapur í Norðurlandaráðnum og ráðharraráðnum eru í stríð við donsku grundlógina. Tað var Frederik Harhoff, ríkisrættarserfrøðingur, sum kom við nýggjum greiningum, sum siga, at løgfrøðiligar forðingar eru fyri føroyskum limaskapi**

POLITIKKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*



Frederik Harhoff sigur, at hetta er sama úrslit, sum hann er komin til fyrr, og at hetta er sama niðurstøða, sum hann legði fram í Føroyum fyrr í summar.

– Eg havi ongantíð sagt, at tað ikki vóru ríkisrættarligir trupulleikar við at Føroyar kundu blíva limir av Norðurlandaráðharraráð num, sigur Frederik Harhoff.

– Eg skilji ikki, hvussu fólk hava kunna misskilt tað.

Tað eru ongir trupulleikar í, at Føroyar eru limir í Norðurlandaráðnum. Men sambært grundlógini grein 19 er tað danska stjórnin, sum umboðar Danmark í uttanríkismálum.

– Soleiðis sum grundlógin sær út nú, kunnu Føroyar og Grønland ikki gerast sjálvstøðugir limir í norðurlendska ráðharraráðnum, tey kunnu ikki umboða seg sjálvi í egnum navni, sigur Frederik Harhoff.

– Fyri at kunna tað, skulu tey vera sjálvstøðugir statir, ið hava fult fólkarættarligt sjálvstýri.

Samstundis peikar Frederik Harhoff á heimildarlógina.

– Føroyar og Grønland kunnu gera avtalur við onnur lond vegna seg sjálvi, men Danmark kann ikki hava fleiri sjálvstøðugar limir í Norðurlandaráðnum. Vit eru eitt ríki, og tí kunnu vit bert hava eina atkvøðu yvirfyri øðrum. Vit kunnu ikki koma í tí støðu, har vit standa við tveimum atkvøðum.

Halgir W. Poulsen løgfrøðingur segði við Sosialin fríggjadagin, at um danska stjórnin ynskti at Føroyar skuldi gerast limur í ráðharraráðnum, so kundi grundlógin tulkast á tann hátt, at hetta gjørdist møguligt. Til hetta sigur Frederik Harhoff:

– Grundlógin kann ikki tulkast á nakran annan hátt. Grundlógin verður ikki tulkað leysliga, og hon kann avgjørt ikki tulkast, soleiðis sum stjórnin hevur hug til.